## Vinnarar hjá B71

Sum vit søgdu í farnu viku, so vann B71 kappingina í 3. deild við sigri á B36. Ta ferðina eydnaðist okkum ikki at fáa myndina av liðnum, men nú er hendan so komin. Á liðnum seinasta leygardag vóru standandi frá vinstru: Jónsvein Bærentsen, Ebbe Kristin Thomsen, Jógvan Vest, Símin Jensen, Kristoffur Vidtfeldt, Julian Thomsen, Torbjørn Jensen(venjari), Eli Hentze og Johannes Jensen. Húkandi eru Hans Hildibjart Winther, Ásmund Zachariassen, Jón Koytu Petersen, Petur Petersen, Hendrik Juul, Kári Sørensen(leikandi venjari), Meinhard Winther.



Skála-Víkingur 1-2 (0-0):

# Víkingar sendu Skála niður

**Eina løtu var Skála á sigurskós, og sigursmálið til 2-1 til Víking var brotsspark, meðan skálamenn skoraðu útjavnandi málið í egið net**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*Skála*

*Víkingur*



*Pætur Dam Jacobsen, liðskipari, og John Petersen, venjari, máttu ásanna, at Sølvi Vatnhamar og Víkingur ikki vóru til at syfta. Og so er niðurflytingin hjá Skála veruleiki*

*Mynd: Jóannes Poulsen*

Teir vóru verdugir og sinniligir. Men tað var eingin ivi um, at tað neit í mønu og merg hjá spælarum og ábyrgdarpersónunum og hjá trúgvu stuðlunum, tá ið tað eitt sindur áðrenn klokkan fimm seinnapartin í gjár varð greitt, at Skála ikki verður partur av bestu deildini í 2009.

Skála legði á heimavølli rygg til 2-1 tap ímóti Víkingi, og harvið er tað hagtalsliga ikki møguligt hjá Skála at røkka hægri enn næstaftasta plássið. Tí er niðurflytingin staðfest undan tveimum teimum síðstu umførunum.

1. hálvleikur var ikki so ógvuliga lívligur. Skála vísti størri vilja enn mótstøðumenninir, sum meiri ella minni tykjast hava tikið til eftirtektar, at endastøðan hjá teimum verður niðanfyri heiðursmerkjaplássini og kanska eisini niðanfyri miðstrikuna.

Geza Turi bjargaði tíðliga frísparksroynd frá Poul N. Poulsen til horna, og eftir hornasparksinnleggið sendi liðformaðurin Pætur Dam Jacobsen við høvdinum bóltin upp um málið hjá Víkinga málverjanum.

Leiðslumálið, sum kveikti lítla vón um, at tað kanska fór at eydnast at sleppa burtur úr annars meiri ella minni vónleysu støðuni, skoraði Skála lítla løtu eftir steðgin. Skála legði bragdliga fyri eftir hvíldina, og tá ið stóripinnur hevði verið tríggjar ferðir runt, skoraðu teir eftir hornasparksinnlegg. Bogi Gregersen, sum hevur verið væl upplagdur, síðani hann í summar aftur fór at hjálpa til, smekkaði til, eftir at bólturin var komin út frá, og bólturin sang í netinum aftanfyri Geza Turi.

Skála kom ikki nærri bjarginginí enn tepru leiðsluni. Eftir skotríðu var Pætur Dam Jacobsen so óheppin, at hann við høvdinum snittaði bóltin upp um Predrag Markovic í Skála málinum. So stóð á jøvnum, og Víkingur skoraði sigursmálið við brotssparki, sum miðvallarin Sam Jacobsen umsetti til mál.

Tá ið dómarin hevði bríslað fyri síðstu ferð, fegnaðust teir ljósa bláu um sigurin og tey trý stigini, men tað var ikki sørt, at tað eisini kendist sum um, at teir høvdu ilt av mótstøðumonnunum, sum teir ikki fara at hitta næsta kappingarár.

# Nýtt ættarlið skal bera Skála fram aftur

**Formaðurin Bergur Højgaard sigur seg rokna við, at tað verður við nýggjum stuðulsspælarum, at Skála skjótt verður aftur at síggja í fremstu røð**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var um hesa tíðina í 2001, at tað gjørdist greitt, at Skála fyri fyrstu ferð nakrantíð skuldi verða partur av bestu fótbóltsdeildini. Skála vann næstfremsta plássið í næstbestu deildini, og tað bar við sær, at Skála skuldi spæla um eitt pláss í bestu deildini.

Mótstøðuliðið var B71, sum var endað á næstaftast í bestu deildini. Í morgin fyri sjey árum síðani vann Skála 4-1 á Sandi, og 13. oktober varð plássið í bestu deildini staðfest á Skála, har tað ikki var nóg mikið hjá B71 at vinna 1-0.

Síðani hevur Skála verið partur av bestu deildini. Í 2002 endaðu skálamenn á 8. plássi, og í 2003 vóru teir nummar níggju. Tá var neyðugt við endaspæli ímóti TB, áðrenn tað varð greitt, at Skála væl og virðiliga hevði varðveitt plássið í deildini.

Í 2004 vann Skála fyri fyrstu ferð heiðursmerkir, tá ið liðið endaði á triðja plássi. Undan 2005 kappingarárinum var áhugaverda og hugflogsríka Skála liðið av mongum mett at vera møguleiki fyri at vera við í toppstríðnum, og tað var reppið, at Skála vann FM í 2004. Um marginal dómaraavgerð eitt góðveðurskvøld í Runavík hevði verið øðrvísi, so hevði Skála ivaleyst verið meistari.

Nú er hetta søga. Í 2006 varð Skála nummar sjey, í fjør nummar seks, og uttan mun til um Skála í ár verður aftast ella næstaftast, so verður luturin í 2009 at vera partur av næstbestu deildini og harvið at stríðast fyri at vinna plássið í Formula deildini aftur.

Bergur Højgaard er formaður í Skála Ítróttarfelag. Hann heldur, at tað hevur havt alstóran týdning fyri spælararnar, felagið, viðhaldsfólkini og bygdirnar, sum stuðla felagnum, at liðið hevur verið við til at seta dám á fremstu fótbóltsdeildina.

Skála er flutt niður, men skálamenn ætla sær aftur at gerast partur av bestu deildini. Tað kann væl vera, at fleiri av teimum, sum øll árini hava verið við til at mynda liðið, eisini fara at spæla næstu árini, men formaðurin heldur, at tað kann roknast við, at eitt nýtt ættarlið fer at verða við til at mynda liðið:

- Teir, sum higartil hava verið í fremstu røð, hava verið við í mong ár, og onkrir teirra eru givnir, og aðrir fara ivaleyst at repa seglini, hóast teir fara at spæla í eitt og vónandi fleiri ár afturat. Men vit kvíga ikki fyri framtíðini, tí vit eiga fleiri dugnaligar og evnaríkar spælarar í bæði unglingadeildini og dreingjadeildini, sigur Skála formaðurin.

Annan sunnudag fer Skála at fáa vitjan av EB/Streymi, sum stríðist við at fáa fyrsta FM heitið til høldar, og tað verður í Runavík, at Skála leygardagin 25. oktober fer at siga farvæl við Formula fótbólt – í hesum umfarinum!